VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin
Fyrrapartin lot av ymsum ættum, trut og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið leygardagin:
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt, men seinnapartin regn. Um kvøldið hækkar hann upp í landnyrðing og ælingur. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðing, seinni lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin veksur hann vindin upp í hvassan vind ella skrið av landnyrðingi og regn. Hitin millum 4 og 7 stig Týsdagin minkar hann vindin av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

Prestá verður gjørt til fríøki

Økið við Prestá verður nú eftir ætlan gjørt til fríøki

HEINI S. KRISTIANSEN
heinik@sosialurin.fo

Skálanevndin í Runavíkar Kommunu fer í næstum at senda út kunningarskriv til "Prestástuðlarnar" um ætlaða fríðkanina av fríøkinum við Prestá. Í oktober 2005 var ein fundur í Skála skúla, har greitt varð frá ætlanini at gera eitt fríøki úti við Prestá. Tummas Mekal Jacobsen greiddi sera væl frá hugskotinum um fríøki og frá tí arbeiði, sum higartil er gjørt. Tilgerðin av økinum skal í fyrsta umfari fevna um:

· at drena og planta
· at gera gøtuna út á Berjarheygg
· at gera brúnna um ánna

Á fundinum vóru eisini Tróndur Leivsson frá Skógrøkt Landsins og Símun V. Arge frá Føroya Fornminnissavni. At enda fingu fólk høvi at skriva seg á ein lista sum "Prestástuðlar".

Fyrst í hesum árinum var brævasamband við Skógrøkt Landsins um stuðulsmøguleikar til planting.

10. mai var Tróndur Leivsson á Prestáodda saman við fyrirreikarunum. Hann segði sína hugsan um, hvat skuldi gerast við ánna og brúnna, og hvussu økið skuldi drenast. Hann hevði so eisini eitt uppskot um hvørjar plantur skuldu vera hvar. Frágreiðing sæst á heimasíðuni hjá kommununi www.runavik.fo/presta.

1. juni vitjaði Símun V. Arge saman við Hákuni Andresen. Gingið varð út eftir gøtuni, og hugt varð at teimum toftum, sum enn síggjast. Fyri at koma víðari við hugskotinum, vórðu tveir ungir danskir býarverkfrøðingar, tvey konufólk, sum vóru í arbeiði hjá Runavíkar kommunu í eitt styttri tíðarskeið, spurdir um at hyggja eftir økinum við Prestá, og so koma við einum hugskoti um, hvussu tær mettu hetta økið kundi brúkast sum frítíðarøki.

Leygardagin er ætlanin at bjóða fólki út á Prestáodda at síggja økið. Fjøran og áarbakkin verða ruddað, og spakin verður settur í til drening. Kaffi og kakur verða at fáa.

Seinni í heyst fáa vit væntandi tey fyrstu trøini, sum verða plantað.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-6
Nuuk	-2
Qaqortoq	2
Ammassalik	--
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	2
Seyðisfjørður	3
Tórshavn	7
Lerwick	6
Aberdeen	11
London	13
Tromsø	--
Bergen	7
Oslo	--
Stokkhólm	4
Keypmannah.	13
Helsinki	2
Moskva	7
Berlin	14
Warzawa	12
Kiev	10
Bukarest	18
Paris	16
Madrid	15
Róm	23
Malorca	29
Athen	21
Malta	26
Tunis	30
Beijing	13
New Dehli	27
Bangkok	34
Jakarta	30
Sydney	17
New York	12
Miami	23
Los Angeles	18
Meksikobýur	22
Panama	32
La Paz	13
Rio de Janeiro	---
Buenos Aires	13

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 981 hPa. yvir Írlandi fer móti Suður-Noreg og dýpist. Eitt annað lágtrýst, 985 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing.



Í dag:
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjakvøldið.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 24/10 kl. 06^{00}– 25/10. 06^{00}. Hitin í gjár: 5,9° Minsti hiti máldur í oktober: - -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/10 kl. 06^{00}– 18/10 kl. 06^{00} Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

Sosialurin

VESTFALLSKYRRINDI

19. oktober Mánin longst frá jørðini
22. oktober Tendring
29. oktober Fyrra kvarter
3. november Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
26. Okt	10.08	22.33	09.08	21.33	09.23	21.48	-	12.08	00.43	13.08	08.23	20.48	07.23	19.48	10.23	22.48	11.23	23.48	09.53	22.18	11.08	23.33
27. Okt	10.58	23.23	09.58	22.23	10.13	22.38	00.33	12.58	01.33	13.58	09.13	21.38	08.13	20.38	11.13	23.38	-	12.13	10.43	23.08	11.58	-
28. Okt	11.48	-	10.48	23.14	11.03	23.29	01.23	13.48	02.34	14.48	10.03	22.29	09.03	21.29	-	12.03	00.08	13.03	11.33	23.59	00.23	12.48
29. Okt	00.14	12.11	11.11	23.36	11.26	23.51	02.14	14.11	03.14	15.11	10.26	22.51	09.26	21.51	00.29	12.26	01.29	13.26	11.56	-	01.14	13.11
30. Okt	00.36	13.27	-	12.27	-	12.42	02.36	15.27	03.36	16.27	11.42	-	10.42	23.04	00.51	13.42	01.51	14.42	00.21	13.12	01.36	14.27

5 707265 100050 >